Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Pensjónistar á arbeiðsmarknaðinum

Spurningar:

1. Fer landsstýrismaðurin at gera tað møguligt hjá øllum fólkapensjónistum, ið eru á arbeiðsmarknaðinum, at fáa rætt til dagpening vegna sjúku?
2. Fer landsstýrismaðurin at hækka markið fyri mótrokning í fólkapensjónini, ið samgongan lækkaði úr 60.000 kr. niður á 45.000 kr?
3. Fer landsstýrismaðurin at broyta aldursmarkið fyri skipanina við tillagaðum starvi, so tað fer at bera til at arbeiða í tillagaðum starvi, eftir at viðkomandi er vorðin 67 ár?

Viðmerkingar:

Búskaparráðið hevur lagt frágreiðing fram, ið staðfestir, at stórt starvsfólkatrot er og verður innan almanna-, heilsu- og eldraøkið komandi árini. Fyri at megna hesa avbjóðing verður brúk fyri øllum hondum, ið megna, á arbeiðsmarknaðinum komandi mongu árini. Tað er ein stórur fyrimunur fyri samfelagið, at eisini tey, ið eru farin um pensjónsaldur, eru virkin á arbeiðsmarknaðinum, ynskja tey tað. Tí er alneyðugt, at viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum eru skipað soleiðis, at tey eggja fólki at halda fram á arbeiðsmarknaðinum eftir pensjónsaldur.

Herfyri boðaði landsstýrismaðurin frá, at tey við útsettari pensjón skulu fáa atgongd til dagpening vegna sjúku. Hetta er bert ein elalítil partur av teimum, ið eru fólkapensjónistar, og tí kann tað undra, at ikki verður skipað soleiðis fyri, at allir pensjónistar, ið eru á arbeiðsmarknaðinum, fáa dagpening vegna sjúku.

Sitandi samgonga lækkaði markið fyri mótrokning í fólkapensjónini úr 60.000 kr. niður í 40.000 kr. At mótrokningarfría upphæddin er so lág, ger tað ikki eggjandi hjá pensjónistum at arbeiða og rakar tey, ið hava eina lítla uppsparing, lutfalsliga hart.

Í dag mugu fólk, ið eru í tillagaðum starvi, fara av arbeiðsmarknaðinum, tá ið tey gerast pensjónistar. Eitt amboð, ið vildi gjørt tað møguligt hjá hesum bólki at hildið fram á arbeiðsmarknaðinum, hevði verið at avtikið ella hækkað aldursmarkið fyri, nær henda skipan heldur uppat.

Á Løgtingi, 27. mai 2021

Eyðgunn Samuelsen